## Løgreglumenn í kravgongu

Fleiri túsund spanskir løgreglumenn gingu um vikuskiftið kravgongu í Madrid. Hetta var onnur kravgongan síðani seinasta heyst, og tá eins og nú kravdu løgreglumenninir hægri løn. Hildið verður, at einir 22.000 løgreglumenn vóru við í kravgonguni, sum var sera friðarlig. Løgreglumenninir vilja hava somu løn sum teir lokalu embætismenninir kring landið, og harafturat vilja teir hava stytri vaktir. Stjórnin hevur svarað, at løgreglumenninir hava júst fingið trý prosent meiri løn, meðan teir lokalu embætismenninir bara fingu tvey prosent.



## Ísbjarnirnar hvørva

Tað er stórur vandi fyri, at ísbjarnirnar í tí arktiska økinum fara at doyggja út orsakað av tí veksandi hitanum á jørðini. Metingar hjá US Geological Survey vísa, at ein triðingur av teimum 20.000-25.000 ísbjarnunum, sum eru í tí arktiska økinum, fara at hvørva innan 50 ár. Í næstu viku hittast serfrøðingar úr londunum í póløkinum í Tromsø í Noregi at tosa um framtíðina hjá ísbjørnini. Har skulu serfrøðingarnir tosa um tær broytingar, sum hava hótt ísbjørnina, síðani altjóða avtalan um at verja ísbjørnina kom í gildi í 1973.

# inn á Johan Dahl

**Landsstýrismaðurin í Vinnumálum krevur fult vald í nevndini í P/F Atlantic Airways, og privatu partaeigararnir missa sítt umboð í nevndini. Stórsti einstaki eigarin, Adrian Noskwith, krevur, at landið keypir partabrøvini aftur fyri upprunaprís. – Føroyska stjórnin hevur brotið sítt lyfti, sigur hann**

ATLANTSFLOG
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Ákoyringarnar hekla niður yvir landsstýrismannin í Vinnumálum, Johan Dahl, nú hann vil hava fult vald í nevndini í Atlantic Airways.

Landsstýrismaðurin hevur alment meldað út, at hann vil skifta alla nevndina í Atlantsflogi út tá aðalfundur verður 2. apríl, og at hann harafturat vil skipa so fyri, at privatu partaeigararnir missa rættin til at velja ein nevndarlim, og tí verða fullkomiliga uttan ávirkan, hóast teir eiga tilsamans ein triðing av felagnum.

Hetta hóvar privatu partaeigarunum lítið. Adrian Noskwith er stórsti einstaki privati partaeigarin í Atlantsflogi, og er royndur maður innan flogvinnuna, eitt nú er hann stovnari av flogfelagnum Centerline Aviation í Bretlandi. 10 mars var hann, saman við Arna Gunnarsson, stjóra í Air Iceland, og Petur Eiriksson, nevndarlimi fyri minnilutan í Atlantic Airways, á fundi við Johan Dahl.

Í einum brævi til landsstýrismannin í Vinnumálum, sum Sosialurin hevur fingið innlit í, harmast og átalar hann harðliga framferðina hjá landsstýrismanninum.

Hann skrivar millum annað soleiðis.

»Føroyska stjórnin hevur ikki livað upp til tey lyfti, ið vóru givin, tá ein triðingur av tjóðarflogfelagnum varð privatiseraður í 2007. Føroyska stjórnin gav tá lyfti um, at hon skuldi ikki blanda seg í viðurskifti hjá felagnum. Gerðirnar hjá stjórnini síðan tá hava verið júst tað mótsetta. Hesar gerðir hava gjørt flogfelagið til ein politiskan fótbólt, og hava álvarliga skatt flogfelagið og virðið á partabrøvum tess.«

### Íleggjarar mist alt álit á Landsstýrið

Adrian Noskwith skrivar víðari soleiðis. »Ætlanin hjá føroysku stjórnini at skifta nevndina út tí, sum tú eisini endurtók fleiri ferðir á fundinum okkara millum, at tú vildi hava fult vald, fer bara at versna um umdømið hjá flogfelagnum og virðið á partabrøvunum. Tínar gerðir hava gjørt partabrøvini fullkomiliga óáhugaverd. Orsakað av framferðini hjá føroysku stjórnini vil eingin keypa partabrøv frá føroysku stjórnini nú, ei heldur fara møguligir keyparar nakrantíð at kunna líta á, at føroyska stjórnin ikki ger á sama hátt aftur í framtíðini. Sum úrslit av hesum eru íleggjararnir fullkomiliga gíslatiknir av føroysku sjtórnini.«

### Ongin verjir minnilutan

Adrian Noskwith steðgar ikki har, men heldur áfram, at hann ivast í motivunum hjá Johan Dahl handan tær ætlanir, hann hevur.

Adrian Noskwith sigur, at hann sjálvur hevur fult álit á bæði nevnd og leiðsluni í Atlantsflogi, og hann heldur tað verða burtur úr vón og viti at skrykkja nevndina upp við rót, og harvið tveita 53 ára royndir í flogvinnuni fyri borð.

Harafturat skrivar hann, at »hvørt nevndin verður skift ella ikki, so tykist eingin ivi verða um, at landsstýrismaðurin fer at útinna vald gjøgnum nevndina. Í ljósinum á hesum fastleikanum er tað ótrúliga vónbrótandi at ongar mannagongdir eru til at verja minnilutaeigarar ella til at regulera forholdið millum stjórnina og privatar partaeigarar. Óansæð um tað vóru slíkar mannagongdir, staðfesti landsstýrismaðurin ferð eftir ferð í gjár, at hann vildi hava valdið«

Út frá tí, sum Johan Dahl hevur sagt á fundinum teirra millum, so sær hann ongan annan veg út fyri privatu partaeigararnar, enn at landið keypir privatiseraða triðingin aftur fyri upprunaprísin.

# Rætt at steðga á við at einskilja Atlantic Airways

**Landsstýrismaðurin í vinnumálum heldur fast um, at tað var rætt av landsstýrinum at bíða við at einskilja størri part av Atlantic Airways, soleiðis sum umstøðurnar á marknaðinum og í flogvinnuni eru**

EINSKILJING
*Jan Müller/Árni Joensen*
*jan@sosialurin.fo*
*arni@sosialurin.fo*

**Sosialurin/Rás2:** Viðurskiftini á partabrævamarknaðinum eru ikki til vildar. Tað er støðan í flogvinnuni heldur ikki, og tí var tað rætt av landsstýrinum at gera av at bíða við at einskilja ein størri part av Atlantic Airways enn tann eina triðingin, sum bleiv einskildur í 2007.

Tað heldur í hvussu er Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum. Fleiri hava funnist at avgerð hansara, tí tey vilja vera við, at tað kann virka ørkymlandi fyri íleggjarar, at høvuðspartaeigarin í felagnum brádliga broytir kós og vísir frá tí, sum upprunaliga bleiv sagt.

Men Johan Dahl er ikki so eymur um íleggjararnar. Hann vísir á, at tann privata íløgan, sum er gjørd í Atlantsflog, man vera ein tann tryggasta íløgan, sum nakar privatur partaeigari hevur gjørt, soleiðis sum støðan er í løtuni. Øll onnur, sum hava sett pengar í partabrøv, hava mist pengar, men tey, sum hava sett pengar í partabrøv í Atlantsflogi, hava einki mist, sigur Johan Dahl við Rás2.

### Seinkingin kanska óheppin

Landsstýrismaðurin heldur, at avgerðin hjá landsstýrinum at steðga á við einskiljingini, er ein reeall avgerð, og at tað er ábyrgdin hjá landsstýrinum sum høvuðspartaeigara at at tryggja, at felagið er í forsvarligum fíggjarligum skapi.

- Men hava teir privatu íleggjararnir ikki sett pengar í felagið undir skeivur fyritreytum, tá landsstýrið nú fer frá tí, sum bleiv lovað í byrjanini?

- Eg vil siga, at tað er kanska óheppið, at einskiljingartilgongdin er seinkað, men hon er ikki løgd í eina skuffu. Hon er seinkað orsakað av støðuni á marknaðinum, og eg trúgvi, at eitthvørt felag í heiminum hevði gjørt tað sama í somu støðu, sigur Johan Dahl.

Landsstýrismaðurin sigur, at skuldi tað hent, at privatir partaeigarar í Atlantic Airways krevja at fáa sín pening aftur, tí landsstýrið er vikið frá teirri fráboðaðu ætlanini, so er tað eitt mál, sum tann politiski myndugleikin má taka støðu til.

- Er politisk undirtøka fyri at rinda peningin aftur, so er tað væl tað rætta, sigur Johan Dahl við Rás2.

# Claus Rasmussen helst nevndarformaður í Atlantsflog

**Á aðalfundinum hjá Atlantsflog 2. apríl, fer Johan Dahl, vinnumálaráðharri, at velja fýra nýggjar nevndarlimir í Atlantsflog. Sannlíkt er, at Claus Rasmussen verður nevndarformaður**

ATLANTSFLOG
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í núverandi nevndini í Atlantsflog sita fimm nevndarlimir. Landsstýrismaðurin velur tveir, privatu partaeigararnir ein, meðan tveir nevndarlimir eru starvsfólkaumboð.

Nevndin í felagnum sær soleiðis út:

Christian Andreasen, formaður, Petur Jónasson Eiriksson, Eyðfinnur Jacobsen (valdur av privatu partaeigarunum), Ingi Solberg Joensen, Verna Løvendahl-Rasmussen.

Sambært skjølum, sum Portalurin hevur fingið innlit í, so ætlar Johan Dahl ongan av teimum trimum nevndarlimunum at velja aftur í nevndina. Hann ætlar at hækka talið á nevndarlimum við einum, og hann fer at velja Claus Rasmussen, grannskoðara og nevndarformaður í Føroya Banka, í nevndina eins og Jens Willumsen, sum hevur starvast hjá SAS.

Privatu partaeigararnir missa møguleikan at velja ein nevndarlim, men Johan Dahl hevur sagt, at hann fer at biða teir privatu koma við uppskoti um nevndarlim.

